Finnur Helmsdal:

# –Eg skuldi fingið møguleikan

**Finnur Helmsdal er ikki nøgdur við, at hann ikki fekk møguleikan at royna seg í Tinganesi. Hann er ónøgdur við møguleikarnar, ið hann fekk undir valstríðnum. Í løtuni hevur hann ongar ætlanir um at stilla uppaftur**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



*– Eg havi ongantíð kravt nakað, men eg haldi framvegis, at tað er løgið, at eg ikki kundi fáa møguleikan, sigur Finnur Helmsdal, sum er ónøgdur við valið av landsstýrismonnum hjá Tjóðveldisflokkinum.*

Finnur Helmsdal, sum seinastu fýra árini hevur sitið á tingi sum varamaður fyri Tjóðveldisflokkin, er als ikki nøgdur við, at hann varð vrakaður til ein sess í landsstýrinum. Tað er sessurin, sum almannamálaráðharri, sum Finnur Helmsdal hevur eitt gott eyga á.

– Eg átti at fingið kjansin til at diskvalifiserað meg sjálvan. Við mínum royndum, kundi eg fyrst sloppið at roynt meg, áðrenn eg varð diskvalifiseraður. Eg skuldi havt verið eitt tað fremsta evnið, sigur Finnur Helmsdal.

Seinastu fýra árini hevur hann verið talsmaður fyri Tjóðveldisflokkin í flestu almannamálum, og hann heldur eisini, at hann hevur fortreytirnar til ein landsstýrissess.

– Eg eri í tveimum førum vorðin burturdømdur. Hetta er eitt misálit til mín, sigur Finnur Helmsdal.

Hann sipar til, at hann í valstríðnum metti seg fáa ógvuliga ringar sømdir frá flokkinum, har hann eitt nú ikki fekk møguleikan í sjónvarpi.

Hann metir, at hann hevur yvirraska í flokkinum, tí hann fekk so mikið av atkvøðum til løgtinsvalið, og hann var bert tvær atkvøður frá at gerast fyrsta varamaður fyri Tjóðveldisflokkin í Suðurstreymoy.

– Eg havi ongantíð kravt nakað, men eg haldi framvegis, at tað er løgið, at eg ikki kundi fáa møguleikan, sigur Finnur Helmsdal.

### Løgið

Finnur Helmsdal er eisini misnøgdur við, at hann ikki rak inn um tinggáttina, tí hann metir Annitu á Fríðriksmørk verið eina hóskandi landsstýriskvinnu í mentanarmálum.

– Eg havi einki ímóti Annlis Bjarkhamar, men eg meti tað vera løgið, at mann velur eina 28 ára gamla við ongum politiskum royndum fram um eina, sum er vald inn tvær reisir við stórum stíli, sigur Finnur Helmsdal.

Um Annita á Fríðriksmørk hevði endað í landsstýrinum, so hevði Finnur Helmsdal endað aftur í tinginum, tí hann gjørdist nummar fimm á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymoy,og Høgni Hoydal er frammanundan landsstýrismaður úr sama valdømi.

Hann sigur seg hava varhugan av, at avgerðin, um at seta hana í landsstýrissessin, var taktiskt.

Finnur Helmsdal sigur seg eisini vera sannførdan um, at Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum, persónliga er ímóti sær.

– Eg dugi ikki at síggja, at eg havi nakran serliga framtíð í politikki, so leingi Høgni ræður. Í løtuni havi eg ongar ætlanir um at stilla uppaftur, sigur Finnur Helmsdal.

– Politikkur er eitt hart og kontant spæl, og eg má bara ásanna, at eg tapti, sigur Finnur Helmsdal at enda.

Hóast nógvar royndir, so eydnaðist tað ikki okkum at fáa hendur á Høgna Hoydal ella Annitu á Fríðriksmørk.

# Føroyskt.fo

**Landaøkið .fo er komin undir føroyska umsiting. Vinnumálastýrið hevur í samstarvið við KT-vinnuna orðað nakrar nýggjar føroyska spælireglar í til umsitingina av føroyska navnaøkinum á Internetinum**

KT
*Heri á Rógvi*

Tey flestu kenna óivað Internet eftirnavnið .fo. Tað er hetta frámerki Føroyar á tí stóra alnetinum. Umleið 800 tílík nøvn er longu skrásett, og ætlanin er nú, at talið skal gerast munandi hægri.

Áður hevur ein donsk fyritøka umsitið hetta fyri føroyingar. Tað er annars ein amerikonsk fyritøka, sum umsitur alt hetta við domænum, t.e. navnaøkjum. Føroyska navnið .fo er so komin á føroyskar hendur og undir føroyska umsiting.

Tað er vinnumálastýrið, sum stendur fyri umsitingini. Vinnuráðið hevur gjørt av at seta á stovn eitt so-kallað FO-ráð, sum fer at taka sær av øllum arbeiðinum í sambandi við landaøkið .fo.

FO-ráðið hevur fýra limir, og hesir eru bíttir millum tað almenna og KT-felagið, sum er eitt vinnufelag fyri KT-fyritøkur í Føroyum.

### Munur á

Dysturin um eftirspurd nøvn joensen.fo, jacobsen.fo. bjarni.fo, hans.fo osfr. fer av álvara ígongd 20. juni, tá FO-ráðið fer at taka ímóti umsóknin. Tí hóast føroyskar reglarnir ikki teljast í tí super liberala endanum, so fer tað nú at bera til at gera nøkur ting, sum ikki bóru til áður.

Sum nevnt, so kann ein og hvør við navninum Bjarni nú søkja um at fáa adressuna www.bjarni.fo. Hetta hevur ikki verið møguligt áður, men nú ber til.

Tað eru tó ymsar treytir. Eitt nú skalt tú hava fingið tær eitt ambætarapláss, t.e. IP-nummar, og so skulu øll við navninum Bjarni hava sama møguleika. Koma fleiri umsóknir, so verður tað loyst við lutakasti.

Í stuttum ber tað til at siga, at tað nú eru fleiri møguleikar til at fáa sær .fo nøvn, men hetta krevur í fleiri førum, at tú eigur rættindi til hetta.

Í FO-ráðnum sita Petur Zachariasen, formaður, Esbern Hansen, Óli Simonsen og Anna Sólva Olsen.

Meira kann lesast á www.nic.fo



*Petur Zachariasen er formaður fyri FO-ráðið. Aftanfyri hómast Bjarni Djurholm. Meira kann lesast um hann á www.djurholm.fo*


**Rørleggjarar/-Blikksmiðir**

Søkt verður eftir rørleggjarum og/ella blikksmiðum ella øðrum hondverkarum til alt fyrifallandi hvsarbeiði at byrja beinanvegin ella aftaná summarferiuna viku 32.

**Hans Dam, tlf. 218534**


# ítróttur

Nr. 112 • leygardagur • 15. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Frank Skytte uppdagaði Christian Poulsen



*Hevði tað staðið til mín, so hevði Christian Poulsen so avgjørt verið keyptur til Hvidovre, sigur B68-venjarin um leikaran, sum innan hálvt ár tók stigið frá Holbæk til fastan fús á danska meistaraliðnum*

**B68 venjarin hevur serligar orsøkir at fylgja væl við í, hvussu tað gongst yngsta miðvallaranum hjá dønum, sum síðstu árini hevur verið liðfelagi hjá Toda Jónsson**

HM KAPPINGIN OG B68 VENJARIN
*Jóannes Hansen*

Danski B68 venjarin fylgir sjálvandi væl við í, hvussu tað gongst landsmonnum hansara í HM endaspælinum. Á middegi í dag fer hann saman við kanska einum helmingi av landsmonnum sínum og einari rúgvu av føroyingum og fótbóltsáhugaðum kring allan heimin at hyggja at áttandapartsfinaluni, har Ongland verður mótstøðuliðið hjá Danmark. Men í dag verður spælarin, sum Frank Skytte fram um allar hinar á danska landsliðnum kennir, ikki at spæla við. Christian Poulsen, sum er yngsti danski spælarin, og sum í dystunum í innleiðandi umfarinum hevur strítt seg alt nærri plássi millum teir fyrstu ellivu, er leikbannaður.

– Hann hevur fingið tvey gul kort, og um eg hevði verið venjari hjá honum nú, so hevði hann avgjørt fingið at vita, at tað líktist ongum, at hann fekk seinna kortið. Tað var púra óneyðugt hjá honum at gera brotið á reglurnar, sum sjálvsagt bar kortið við sær, heldur Frank Skytte.

B68 venjarin kennir væl Christian Poulsen, sum tey seinastu árini hevur spælt saman við Toda Jónsson í FCK. Og Frank Skytte heldur unga mannin úr Holbæk vera dømi um, hvussu langt tað ber til at røkka, tá vilji, disiplin og góður hugburður verða knýtt afturat evnunum at spæla fótbólt, sum so nógvir aðrir eisini hava.

– Christian Poulsen er seldur til Schalke 04 fyri 52 milliónir krónur. Tað hevur hann uppiborið, og eg rokni við, at hann fer at røkka langt sum fótbóltsspælari. Hann er jú bara 22 ára gamal, so hann átti framvegis at havt bestu fótbóltstíðina fyri sær.

### Eyðmjúkan hugburð

Áðrenn Frank Skytte fór til Hvidovre at vera venjari, var hann í 1996 og í 1997 venjari í Holbæk. Í sjeyti árunum var felagið í sælandska keypsstaðnum eitt skifti í bestu deildini, men nú er tað ein fjórðingsøld síðani. Tá pengarnir av álvara fóru at stýra gongdini í donskum fótbólti, megnaði Holbæk saman við so nógvum øðrum ikki at fylgja við, og tey seinnu árini hava teir fyri tað besta verið í triði bestu deildini, og onkra ferðina hava teir verið uttanfyri divisiónirnar.

– Mítt sjónarmið hevur altíð verið, at venjarin hjá 1. liði eigur at fylgja við í tí, sum gongur fyri seg í yngru liðunum. Tá eg kom til Holbæk, legði eg beinanvegin til merkis, at ein av 2. juniorsspælarunum (tað svarar til føroysku dreingjadeildina) vísti framúr avrik. Talan var um Christian Poulsen, sum tá var 16 ára gamal. Hann hevði framúr hugburð til ítróttin, og venjingarstøðan hjá honum var væl betri, enn hon var hjá øllum hinum. Tí megnaði hann at arbeiða sum ein hestur, umframt at hann vísti gott hegni og skil.

Árið eftir flutti Christian Poulsen upp í unglingadeildina, men har spældi hann bara í eitt ár. Árið var ikki so gamalt, tá Frank Skytte av og á hevði hann við á divisiónsliðnum:

– Eg var bergtikin av hugburðinum hjá honum. Hann var stjørnan á unglingaliðnum. Tá eg vildi hava hann við í hópin hjá mær, so var tað sum seytjandi maðurin, tá vit høvdu sekstan spælarar í hóp-inum. Tá vit fóru til Jyllands at spæla, fóru vit ofta avstað dagin fyri. Tí vildi eg hava ein eyka spælara við. Tað kundi jú koma fyri, at onkur gjørdist sjúkur, ella at okkurt annað spældi inn. Christian var ofta seytjandi maður. Men tað rørdi hann ikki, at hann oftast var áskoðari. Hann hevði skúlabøkurnar við, og hann var altíð klárur at tørna til, um tað var neyðugt.

### Stríddi seg til sáttmála

Í 1997 gekk tað einki serligt hjá Holbæk fyrrapartin av kappingarárinum, tá liðið var millum evnini til niðurflyting. Men sum tað leið út á árið hilnaðist alt betri, og tað endaði so mikið væl, at Holbæk flutti upp í næstbestu deildina.

– Christian Poulsen átti avgjørt sín lut í, at tað rættuliga fór at ganga uppeftir. Hann var fastur maður í 1. liðshópinum. Ofta varð hann skiftur inn, og í trimum teimum síðstu umførunum var hann fastur maður. Tá vunnu vit hvørja ferð, fingu níggju stig, og harvið var uppflytingin greið.

Men hann flutti ikki við tær til Hvidovre?

– Nei, men tað hevði hann gjørt, um tað bara stóð til mín at gera av. Eg hevði ein manegara ella stjóra yvir mær. Eg bað hann koma at hyggja at dystum hjá Holbæk júst við tí fyri eyga at sannføra hann um, hvussu góður Christian Poulsen var. Eg fekk stjóran við mær onkra ferðina, men tað spurdist ikki meiri burturúr viðvíkjandi Christiani Poulsen enn tos. Tað var harmuligt fyri Hvidovre, men fyri Christian Poulsen var tað heppið, at hann kom til FCK.

Tað vil siga, at teir í FCK dugdu betri at síggja, hvør dugur var í honum, enn teir í felagnum hjá tær?

– Tað haldi eg ikki, at tað ber til at siga. Christian Poulsen vísti áræði. Hann setti seg í samband við FCK og spurdi, um tað var møguleiki hjá honum at venja saman við teimum. Tað fekk hann loyvi til. Tá hann hevði vant í fýra dagar, gjørdi Roy Hodgson, sum tá var venjari í FCK, av, at teir skuldu skriva sáttmála við unga mannin úr Holbæk, og tað hava teir í FCK neyvan iðrað seg um. Tað var skjótt, at hann gjørdist fastur maður á miðvøllinum, har etableraðu stjørnurnar noyddust at finna seg í, at ein blaðungur spælari var meiri sjálvsagt val til miðvøllin enn teir, sum plagdu at vera har. Men Christian er avgjørt ikki komin sovandi til plássið á miðvøllinum í FCK og á landsliðnum og til sáttmálan við Schalke 04. Hann hevur víst framúr hugburð og vilja, staðfestir Frank Skytte.

Spurningurin er nú, um Christian Poulsen sleppur upp í part aftur í hesi HM kappingini. Um so skal vera, so skal Danmark vinna á Onglandi á middegi í dag. Men tað er eingin ivi um, at Christian Poulsen eigur nógvar landsdystir á, og at hann fer at luttaka í fleiri endaspølum. Sambært Frank Skytte so fer parturin hjá Holbæk dreinginum, sum B68 venjarin fekk á besta liðið fyri fimm árum síðani, ikki at liggja eftir.



*Frank Skytte heldur unga mannin úr Holbæk vera dømi um, hvussu langt tað ber til at røkka, tá vilji, disiplin og góður hugburður verða knýtt afturat evnunum at spæla fótbólt*